# Studningur til føroysk húsdýr

Vísandi til niðanfyri standandi reglugerð verður studningur veittur.

**§1.** Við heimild í høvuðskonto 6.33.2.10 "Landbúnaðarstuðul", undirkonto 10 "Føroysk húsdýr" á fíggjarløgtingslógini, verður ásett, at Jarðarráðið kann veita stuðul til verkætlan um føroysk húsdýr treytað av:
**a)** at umsókn um stuðul er skrivað á serligt umsóknarblað frá Jarðarráðnum, har verkætlanin er nærri lýst
**b)** at Jarðarráðið sendir innkomnar umsóknir til ummælis hjá Almennum Royndum og Ráðgeving

**§2.** Stuðul kann latast til verkætlanir, sum hava til endamáls:
**a)** at menna, styrkja ella bøta um einstøku stovnarnar av føroyskum húsdýrum, til tess at hesir framhaldandi kunnu mynda ein týðandi part av føroyska samleikanum
**b)** at verja og varðveita føroysk húsdýr og teirra serligu eyðkenni, soleiðis at tey ikki forkomast ella fara fyri skeyti.
***Stk. 2.*** Stuðul verður bert veittur um Almennar Royndir og Ráðgeving frammanundan hevur góðkent samlaðu verkætlanina.

**§3.** Jarðarráðið fyrisitur stuðulin og ásetir upphæddir samsvarandi tí, sum avsett er frá fíggjarløgtingslógini og eftir tilmæli frá Almennum Royndum og Ráðgeving.

**§4.** Stuðulin fellur til gjaldingar, tá ætlanin er sýnað og av Almennum Royndum og Ráðgeving mett at vera liðugt.

**§5.** Stuðulsmóttarkari hevur upplýsingarskyldu. Í teimum førum tá viðgerð og avgreiðsla av umsóknum er tengd at ivamálum, hevur Jarðarráðið heimild til at krevja neyðugt skjalatilfar.

**§6.** Henda reglugerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umsóknarbløð, ið skulu nýtast, fáast við at ringja á skrivstovu Jarðarráðsins, og skulu umsóknirnar vera Jarðarráðnum í hendi innan 1. mai 2002.

FØROYA JARÐARRÁÐ

Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • FO-110 Tórshavn
tlf. 311180 • fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo

# Studningur til træplanting

Vísandi til niðanfyri standandi reglugerð verður studningur veittur.

**§1.** Við heimild í høvuðskonto 6.33.2.10 "Landbúnaðarstuðul", undirkonto 09 "Træplanting" á fíggjarløgtingslógini, verður ásett, at Jarðarráiðið kann veita stuðul til verkætlan um træplanting treytað av:
**a)** at umsókn um stuðul er skrivað á serligt umsóknarblað frá Jarðarráðnum, har verkætlanin er nærri lýst
**b)** at Jarðarráðið sendir innkomnar umsóknir til ummælis hjá Skógrøkt Landsins

**§2.** Stuðulin, sum veittur verður, kann í mesta lagi svara til 50 % av kostnaðinum av at keypa trøini, ella so langt játtanin røkkur.

**§3.** Stuðul kann latast til verkætlanir, sum hava til endamáls:
**a)** at verja móti jørðoyðing, at røkja og fríðka landslagið, at skapa størri lívfrøðiligt fjølbroytni í Føroyum, sum eisini kann vera eitt amboð í samband við $CO^2$-útlát og $CO^2$-binding, ella
**b)** at tæna samfelagsgagnligum langtíðar áhugamálum annars.
***Stk. 2.*** Stuðul verður ikki veittur til verkætlanir, sum fevna um plantulendi, ið er minni enn 1.000 $m^2$ til støddar.
***Stk. 3.*** Stuðul verður bert veittur um Skógrøkt Landsins frammanundan hevur góðkent samlaðu verkætlanina.

**§4.** Jarðarráðið fyrisitur stuðulin og ásetir upphæddir samsvarandi tí, sum avsett er á fíggjarløgtingslógini og eftir tilmæli frá Skógrøkt Landsins.

**§5.** Stuðulin fellur til gjaldingar tá trøini eru sett niður, økið stikað av, arbeiðið er sýnað og av Skógrøkt Landsins mett at vera liðugt.

**§6.** Stuðulsmóttarkari hevur upplýsingarskyldu. Í teimum førum tá viðgerð og avgreiðsla av umsóknum er tengd at ivamálum, hevur Jarðarráðið heimild til at krevja neyðugt skjalatilfar.

**§7.** Henda reglugerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umsóknarbløð, ið skulu nýtast, fáast við at ringja á skrivstovu Jarðarráðsins, og skulu umsóknirnar vera Jarðarráðnum í hendi innan 1. mai 2002.

FØROYA JARÐARRÁÐ

Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • FO-110 Tórshavn
tlf. 311180 • fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo




- Starvsfólk!!!

Av tí at P/F SNODD víðkar um virksemi sítt, søkja vit eftir dugnaligum og røskum fólki, til alt vanligt fiska-arbeiði.

Áhugaði kunnu venda sær til:

Skrivstovuna 44 99 94
Dánial 21 25 60
Jóhannus 21 70 60

P/F SNODD

Tel. +298 44 99 94 - Fax. +298 44 91 19 - e-mail. snodd@snodd.fo

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

HEIMASÍÐUSMÍÐ

**Microsoft FrontPage grundskeið 28/02 & 07/03**

**Adobe GoLive grundskeið 02/04 & 10/04**



Lær at fremja grundleggjandi viðlíkahald av heimasíðum við HTML editori.

Tú lærir at skipa viðlíkahaldið so rationelt sum møguligt, at nýta viðlíkahalds-amboðini og at handfara myndir og grafikk.

Tú stovnar eisini eitt webstað frá grundini og byggir tað upp við teksti, myndum, grafikki, tema og øðrum. Lidna arbeiðið lærir tú at leggja á Internetið og tú lærir hentar mannagongdir hesum viðvíkjandi.

http:\\kvasir.farodane.fo TEL 320 204



# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820



**Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu**



**Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.**

| | | |
|---|---|---|
| ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 $m^2$ | prísur einans | kr. 1.895,- |
| ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 $m^2$ | prísur einans | kr. 2.095,- |
| ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 $m^2$ | prísur einans | kr. 2.995,- |

SPF. ALTING tlf. 210 298 fax 318 591

Vit senda um alt landið



bobcat® -maskinurnar sum halda!

- **Gravmaskinur** –nógv model
- **Lessarar við óteljandi møguleikum!**

**Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.**

Keyp góðsku – keyp Bob Cat!



Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820


# ÚTBJÓÐING!

**av vaskingini av trægólvunum í skúlanum á Velbastað**

Kirkjubøar kommuna bjóðar við hesum vaskingina av trægólvunum í skúlanum á Velbastað alment út til áhugaði at røkja.

Vaskingin fevnir um 245 fermetrar av vanligum trægólvi í skúlanum eftir nærri ávísing frá kommununi m.a. viðvíkjandi slag av sápulúti.

Í fyrsta umfari skal vaskast 1 ferð um vikuna, helst fríggjadag, men kommunan tilskilar sær rætt at fremja broytingar hesum viðvíkjandi eftir nærri avtalu partanna millum.

Tilboð samsvarandi hesi útbjóðing skulu stílast
til Kirkjubøar kommunu, 176 Velbastað og verða kommununi í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002 kl. 16.00

Kirkjubøar kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja ímillum innkomin tilboð ella vraka tey øll.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna á Velbastað á tel 328106, Annfinn Brekkstein, borgarstjóra á tel 215800 ella Petur Juul Jacobsen, skrivara á tel 226458

KIRKJUBØAR KOMMUNA

team 85 • 316511


**Søkt verður eftir**

# LÆRLINGI

**at byrja sum skjótast**

**Læran umfatar:** Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði.

**Vit vænta,** at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002.

P/F Hjá Fróða
Yviri við Strond 3 • tel 310808 • fax 314676



NOA NOA®



**Nógv nýtt heimkomið**

**Aftur at fáa:**
**NOA-NOA**
**taskur** fleiri litir **118,-**

29 Í Tróndargøtu tel. 318200